Kommunusamskipan Føroya

R. C. Effersøesgøta 30
Postboks 53
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 30 24 80
Telefaks +298 30 24 81
ksf@ksf.fo
www.ksf.fo

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður
Innlendismálaráðið
Postboks 159
110 Tórshavn

Tórshavn, 27. oktober 2006

**Viðvíkjandi uppskotinum til løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar**

Kommunusamskipan Føroya (KSF) hevur fingið uppskot frá Innlendismálaráðnum til løgtingslóg um sjálvbodnar kommunusamanleggingar til hoyringar.

KSF hevur longu einaferð fyrr í ár fingið fyribils uppskot frá Innlendismálaráðnum um sama mál til viðmerkingar og svaraði við skrivi frá 25. mai 2006.

KSF hevur viðgjørt uppskotið og hevur framvegis í høvuðsheitum somu støðu sum lýst í svarinum í mai. Felagið tekur tí framvegis undir við, at Føroyar verða skipaðar í størri burðardyggari eindir, og at samfelagsmenningin alsamt gongur fram ímóti størri kommunalum eindum. Kortini vil KSF aftur vísa til Grøna álitið, har tilmælið var, at landið verður skipað í 7-9 eindir. Hesa støðu til framtíðar skipanina av føroysku kommununum hevur meirilutin í felagnum framvegis.

KSF metir ikki, at tær 7 eindirnar, ið verða skotnar upp í § 2 í uppskotinum, geva kommununum nevnivert av frælsi og rásarúmi til at ávirka gongdina móti samanlegging og samstarvi, so at úrslitið verður sum best at samsvara við tað, ið kommunurnar halda vera skilagott, eftir at tíð og tilgongd hava givið neyðugar royndir og betur avdúkað áhugamálini.

Ein minniluti, umboðið fyri Tvøroyrar kommunu, tekur kortini undir við uppskotinum frá Innlendismálaráðnum í mun til Suðuroynna, tá ið hetta umboð metir oynna at skula verða skipaða sum eina kommunu.

Tórshavnar kommuna, hevur viðgjørt uppskotið hósdagin 26. oktober 2006 uttan tó at hava tikið støðu í málinum.

Samsvarandi støðuni hjá meirilutanum fer KSF at heita á landsstýrismannin í innlendismálum um at strika tær 7 eindirnar, ið skotnar verða upp í § 2, og heldur seta talið av eindum til 7-9. Einans á ein slíkan hátt kann positiva menningin og samstarvið halda áfram, og bara tá verður veruleiki aftanfyri orðini í heitinum til lógina um “sjálvbodna samanlegging”.

Á sama hátt sum í skrivinum frá í mai vil KSF gera vart við, at orðingin í § 1 í uppskotinum er ov avmarkandi í sambandi við, at kommunalu eindirnar eisini verða ásettar í mun til kommunal samstørv innan lógarbundnar uppgávur. Tænastur, ið eru lógarbundnar, verða veittar borgarunum, uttan at hesar altíð hava við týðandi myndugleikaruppgávur at gera. Tí vil felagið heita á Innlendismálaráðið um at velja eina orðing, ið ikki kann tulkast so, at samstarv um vanligar lógarbundnar tænastuveitingar altíð verða bundnar til at vera innan fyri tær eindir, ið verða ásettar í lógini.

Vinarliga vegna Kommunusamskipan Føroya

Heðin Mortensen
stýrisformaður